FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

Góðu næmingar og lærarar

Vit á Náttúruvísindadeildini eru so sera glað fyri at tit koma at vitja okkum í sambandi við at deildin er 50 ár í ár. Vit fegnast um ta stóru tilmeldingina - fleiri enn 500 næmingar hava meldað seg til tiltakið. Hetta skal nokk blíva festligt :)

Stóra undirtøkan ger, at vit ikki kunnu ganga øllum tíðarynskjum á møti, men vit hava gjørt tað so gott vit kunna. Vónandi eru tíðirnar í lagi. Fyri at fáa allar 500 næmingarnar gjøgnum Sjóvinnuhúsið uppá so stutta tíð, so er tað umráðandi, at tit halda tykkum til ta tíðina, sum tykkum er ásett at møta.

Á mynd 1 síggja tit, hvar tit skulu møta. Her verða tit móttikin av einum "ferðaleiðara"

Tit koma at vitja 7 ymiskar støðir. Støðirnar 1 – 6 eru innandura og eru 10 minuttir hvør. Tit enda vitjanina uttanfyri á støð nr 7 til eina sera spennandi uppliving. "Ferðaleiðarin" fylgir tykkum og hjálpir tykkum finna veg og at halda tíðirnar. Vit hava gjørt eitt skema, so tit síggja, nær tit skulu møta á hvørjari støð.

Sum sagt, so er tað sera umráðandi, at tit møta rættstundis og halda tykkum til skema, sum er viðfest.

Um tit hava næmingar við serligum tørvi ella avbjóðingum, so kunnu tit boða okkum frá.

Lærarar verða bidnir um at vátta hesum telduposti og kanna, at alt er rætt innan mikudagin 16/11-22. Tit skulu upplýsa okkum navn og telefonnr á øllum lærarum og evt. stuðlum, sum vera við. Tá tað eru flokkar yvir 20 næmingar, er ynskiligt, at meir enn ein lærari fylgir flokkinum.

Um spurningar eru, skrivið teldupost til oddvorj@setur.fo ella ring á +298 292266

Vit síggjast!

Vinarliga
Náttúrvísindadeildin

PS:

Vit hava eina kapping á TikTok, brúkarin eitur "nvdsetur". Freistin er úti mikudagin 16/11-22.

Mynd 1



Inngongd